


*Ein av teimum 5 tarvunum, sum vórðu keyptir ársgamlir í mai mánaði í fjør og síðani settir í hagan á Kirkju. Tveir av teimum vórðu slaktaðir fyri jól. Hesin sær meinaleysur út, men tað gongur ikki altíð so friðarliga fyri seg, tá tarvur skal leiðast til slakt*

# Tey drepa tarv á Kirkju

**Fyrsta februar fóru Jógvan Páll Poulsen og aðrir út á Kirkju í Fugloy at slakta 3 tarvar Tarvarnar høvdu teir keypt ársgamlar og havt gangandi, síðani í mai mánaði í fjør. Fugloyingar drepa um 10 tarvar um árið. Hjá summum er tað frítíðarítriv, meðan tað hjá øðrum er ein partur av inntøkuni**

SLAKT

*Orð: Rúna Sivertsen*
*Myndir: Jákup á Fløtti Jacobsen*

- Vit høvdu ætlað okkum út á Kirkju einaferð í januar, men tað viðraði illa, og vit sluppu ikki avstað, sigur Jógvan Páll Poulsen, ið hevur sítt dagliga yrki, sum skipari umborð á Másanum.

Hann sigur, at teir bíðaðu so, til tað aftur varð fyllandi sól.

- Teir gomlu drupu altíð tarv í fyllandi sól. Annað kom ikki uppá tal, tí tá verður kjøtið nógv saftigari, sigur Jógvan Páll Poulsen.

Vit lata myndirnar frá slaktinum tala fyri seg



*Gamalt og nýtt møtist. Dreingirnir hava úr at gera við at senda sms, meðan menninir stríðast við tarvin*



*Tað ræður um at bera skjótt at. So skjótt tarvurin er skotin, má stingast*





*Tungan verður roknað at vera serstakliga fínur matur*



*Mennirnir bera skjótt at og fáa vomb og innvøl úr tarvinum*



*Eitt øgiligt knoss. Magnus koyrir á av øllum alvi. Nú skal tarvurin koyrast við traktorinum niðan í fjósið, har hann skal flettast*



*Tað er lív í fjósinum, nú klárt er at fletta*



*Eisini Kristina roynir at geva eina hond*



*Dampurin stendur enn úr kroppinum. Hesin vá um 180 kg.*



*Nú er næstan komið undir land. Magnus hevur hugagóður hjálpt til, meðan systir hansara, Kristina, fyri tað mesta hevur hugt at*



*Tað kann ikki roknast um í peningi, hvønn týdning tað hevur fyri børn og ung at sleppa at vera við í arbeiðnum*

*Nú eru fjórðingarnir komnir upp at hanga. Gamalt er at lata kjøtið hanga einar 14 dagar, áðrenn kjøtið verður etið*



*Tað er strævið at fletta tarv - Kristina sovnaði beint sum hon sat*

